# Sáttmáli
# fyri fastlønt á fiskavirkjum
# millum

# Føroya Arbeiðarafelag, Havnar Arbeiðsmannafelag, Havnar Arbeiðskvinnufelag, Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag og Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag
# og
# Føroya Arbeiðsgevarafelag

## Partur 1 – Sáttmálaøki

*§1 Sáttmálaøki*

Hesin sáttmáli fevnir um fastlønt arbeiðsfólk á fiskavirkjum, sum fakliga eins væl og landafrøðiliga eru fevnd av økinum hjá Føroya Arbeiðarafelag, Havnar Arbeiðsmannafelag, Havnar Arbeiðskvinnufelag, Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag og Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag.

## Partur 2 – Løn og arbeiðstíð

*§2 Almenn lønarviðurskifti*

Stk. 1. Mánaðarlønin er tímalønin ásett í høvuðssáttmálanum x 173,33, ið er roknað sum 40x52/12

Stk. 2. Starvstíðarviðbøturnar í høvuðssáttmálanum eru eisini galdandi fyri henda sáttmála.

Stk. 3. Lønin verður útgoldin afturút eina ferð um mánaðin, í seinasta lagi 25. í mánaðinum..

Stk. 4. Arbeiðsgevari hevur skyldu at geva arbeiðsfólki sínum lønarseðlar, herundir útgreinaðar tímauppgerðir.

*§3 Tímauppgerð*

Stk. 1. Yvirtíðartímar verða førdir yvir á tímauppgerðina við tí virði, teir hava, umroknað til tímar.

Stk. 2. Grundarlagið undir tímauppgerðini er talið av tøkum arbeiðstímum í undanfarna mánaða, roknað soleiðis: tal av arbeiðsdøgum í undanfarna mánaða x 8, sum er tal av arbeiðstímum í einum degi.

Stk. 3. Undanfarni mánaði merkir í hesum førinum tíðarskeiðið frá 20. í undanfarna mánaða til 19. í inniverandi mánaða.

Stk. 4. Er talið av tímum í tímauppgerðini hægri, enn grundarlagið, sum gjørt er sambært stk. 2 og stk. 3, verða yvirskotstímarnir fluttir á tímauppgerðina.

Stk. 5. Er talið av tímum í tímauppgerðini lægri, enn grundarlagið, sum gjørt er sambært stk. 2 og stk. 3, verða undirskotstímarnir frádrignir tímauppgerðini. Hetta frádrag verður altíð tikið av elstu tímunum í tímauppgerðini.

Stk. 6. Avspáking skal fara fram innan 6 mánaðir eftir at avspákingartímarnir eru uppspardir. Arbeiðsgevari avger í samráð við arbeiðsfólki, nær avspáking kann fara fram.

Stk. 7. Tímar á tímauppgerðini, sum eru eldri enn 6 mánaðir, verða ávikavist útgoldnir ella afturhildnir í lønini.

Afturhald kann í mesta lagi svara til 10% av føstu mánaðarlønini.

Stk. 8. Til ber at gera frávik frá stk. 7 um arbeiðsgevari og arbeiðsfólk verða samd um tað.

Stk. 9. Tá arbeiðsfólk verður sagt úr starvi kann arbeiðsgevari mótrokna undirskotstímar í uppsagnarlønini. Eru fleiri undirskotstímar enn mótroknast kunnu í uppsagnarlønini, fella hesir burtur. Møguligir yvirskotstímar verða útgoldnir arbeiðsfólkinum.

Stk. 10. Tá arbeiðsfólk sjálvt sigur seg úr starvi, kann arbeiðsgevari mótrokna undirskotstímar í restlønarupphæddini/uppsagnarlønini. Eru fleiri undirskotstímar enn mótroknast kunnu í restlønarupphæddini/uppsagnarlønini, kann arbeiðsgevarin krevja, at arbeiðsfólki rindar hesar, tó í mesta lagi svarandi til 1 mánaðarløn. Møguligir yvirskotstímar verða útgoldnir arbeiðsfólkinum.

Stk. 11. Avmarkingarnar í stk. 10 er ikki galdandi, tá uppsagnartíðin í § 9 verður brotin av arbeiðsfólkinum.

## *§4 Forskotin tíð*

Stk. 1. Fyri arbeiði forskotna tíð verða tímar taldir við hesum lutfalli:

| | |
|---|---|
| Tá normalarbeiðstíðin er kl. 07-16 | |
| Millum kl. 16 – 20 | 1,10 |
| Millum kl. 20 – 24 | 1,15 |
| Tá normalarbeiðstíðin er kl. 08-17 | |
| Millum kl. 17 – 21 | 1,10 |
| Millum kl. 21 – 24 og kl. 07 - 08 | 1,15 |
| Tá normalarbeiðstíðin er kl. 09-18 | |
| Millum kl. 18 – 22 | 1,10 |
| Millum kl. 22 – 24 og kl. 07 - 09 | 1,15 |

Stk. 2. Tíðin frá kl. 24.00 – 07.00 umframt arbeiði leygardagar, sunnu- og halgidagar verður altíð at rokna sum yvirtíð sambært § 9 í høvuðssáttmálanum.

Hesir tímar verða hildnir uttanfyri mánaðarliga grundarlagið í § 3, stk. 2 og stk. 3. Tímarnir verða tó ikki útgoldnir serstakt, men fluttir á tímauppgerðina og viðgjørdir sambært § 3.

Ásetingarnar í høvuðssáttmálanum um skiftisvakt og døgndrift eru ikki galdandi fyri fastlønt. Henda áseting forðar tó ikki fyri, at fastlønt arbeiða í skiftisvakt ella døgndrift saman við tímaløntum, men verða tó lønt sambært hesum sáttmála.

*§5 Yvirtíð*

Stk. 1. Verður arbeitt fleiri tímar enn mánaðarliga grundarlagið, sum er gjørt sambært § 3, verður yvirtíðin 35% fyri hesar tímar.

Til ber ikki at fáa viðbót fyri forskotna tíð og yvirtíð fyri sama tíma. Tí fellur ein møgulig viðbót fyri forskotna tíð burtur, um hesir tímar liggja omanfyri mánaðarliga grundarlagið. Ístaðin verður yvirtíð roknað.

Stk. 2. Verður arbeitt fleiri enn 10 tímar í ein dag, verður yvirtíðin roknað soleiðis

| | |
|---|---|
| Fyrstu 2 tímarnar | 35% |
| Fylgjandi tímarnar | 60% |

Hesir yvirtíðartímar verða hildnir uttanfyri mánaðarliga grundarlagið. Tímarnir verða tó ikki útgoldnir serstakt, men fluttir á tímauppgerðina og viðgjørdir sambært § 3.

*§6 Parttíðarsett*

Tímauppgerðirnar omanfyri verða fyri parttíðarsett roknaðar lutfalsliga, og yvirtíð verður roknað sambært § 4 og § 5.

## Partur 3 – Setanarviðurskifti

*§7 Setanarprógv*

Setanarprógv verða givin sambært løgtingslóg um setanarprógv.

*§8 Sjúka, frítíð og frídagar*

Stk. 1. Undir sjúku fáa arbeiðsfólk dagpengar sambært løgtingslóg um dagpengar.

Stk. 2. Arbeiðsfólk, sett eftir hesum sáttmála, hava rætt til frítíð við løn, sum er hildin sambært løgtingslóg um frítíð, heruppií 1,5% í frítíðarískoyti.

Stk. 3. Halgidagar og skeivar frídagar annars verða hildnir sambært høvuðssáttmálanum. Hesir verða ikki frádrignir tímauppgerðini.

*§9 Uppsøgn*

Stk. 1. Fyri fastlønt arbeiðsfólk er uppsagnarfreistin frá arbeiðsgevara síðu:

| | |
|---|---|
| Upp til 6 mánaða starvstíð eftir hesum sáttmála: | 1 mánaði til ein 1. í mánaðinum, |
| frá 6 mdr. til 2 ára starvstíð eftir hesum sáttmála: | 2 mánaðar til ein 1. í mánaðinum, |
| meira enn 2 ára starvstíð eftir hesum sáttmála: | 3 mánaðir til ein 1. í mánaðinum. |

Uppsagnarfreistin við uppsøgn frá arbeiðsfólkinum:1 mánaði til ein 1. í mánaðinum.

Uppsøgnin skal vera skrivlig fyri báðar partar.

*§10 Aðrar ásetingar*

Har annað ikki er nevnt í hesum sáttmála eru ásetingarnar í høvuðssáttmálanum galdandi.

## Partur 4 – Gildiskeið

*§11 Gildisskeið*

Gildiskoma og uppsøgn fylgir høvuðssáttmálanum.

**Tórshavn, 5. juni 2020**

| | |
|---|---|
| **Fyri Føroya Arbeiðsgevarafelag** | **Fyri Føroya Arbeiðarafelag** |
| **Fyri Havnar Arbeiðarafelag** | **Fyri Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag** |
| **Fyri Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag** | **Fyri Havnar Arbeiðskvinnufelag** |